# Umhvørvis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 26. august 2022 |
| Mál nr.: | 21/06449-9 |
| Málsviðgjørt: | jd |
| Ummælistíð: | 26. august-23. september 2022 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð**

**um**

**útrokning av kredittútreiðslum**

Við heimild í § 14, stk. 2 í løgtingslóg nr. 19 frá 8. mai 2008 um marknaðarføring, sum broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 17. mai 2011, løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2014, løgtingslóg nr. 47 frá 12. mai 2015, løgtingslóg nr. 91 fá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 57 frá 2. mai 2022, verður ásett:

**§ 1.** Árligu kostnaðirnir í prosentum verða roknaðir eftir nútíðarvirðinum á øllum komandi ella verandi árligum skyldum, t.d. brúktum kredittmøguleikum, afturgjaldingum og kostnaðum, ið eru avtalaðar millum kredittveitaran og brúkaran.
*Stk. 2.* Árligu kostnaðirnir í prosentum verða roknaðir eftir tí støddfrøðiliga formlinum í skjali 1 til hesa kunngerð.
*Stk. 3.* Allir kostnaðir skulu verða roknaðir uppí, tá ið árligi kostnaðurin í prosentum fyri brúkarakredittin verður ásettur, tó ikki

1) aðrir kostnaðir, sum brúkarin skal gjalda í sambandi við, at hann hevur mishildið skyldur, sum ásettar eru í kredittavtaluni, og
2) kostnaðir, sum verða lagdir afturat keypsprísinum, sum brúkarin skal rinda fyri vørur og tænastur, sama um goldið verður kontant ella keypt verður upp á borg.

*Stk. 4.* Allur kostnaðurin fyri kredittavtaluna skal fevna um kostnaðin av at umsita kontuna, sum verður brúkt til kreditt og gjald, umframt aðrar kostnaðir, sum standast av kredittinum. Hetta er tó ikki galdandi, um tað ikki er eitt krav at stovna kontu, og tá ið kostnaðirnir annars eru greitt tilskilaðir í kredittavtaluni ella í aðrar avtalu við brúkaran.
*Stk. 5.* Útrokningin av árliga kostnaðinum í prosentum er grundað á ta fyritreyt, at kredittavtalan hevur gildi avtalaða tíðarskeiðið, og at kredittveitarin og brúkarin halda sínar skyldur samsvarandi teimum treytum og tíðarfreistum, sum eru ásettar í kredittavtaluni.

*Stk. 6.* Fyri kredittavtalur, sum loyva skiftandi lánsrentu, og, har tað er viðkomandi, skiftandi kostnaðum, sum verða roknaðir upp í árligu kostnaðirnar í prosentum, men sum ikki kunnu verða gjørdir upp, tá ið árligi kostnaðurin í prosentum verður ásettur, verða árligu kostnaðirnir í prosentum roknaðir við tí fyritreyt, at lánsrenta og aðrir kostnaðir eru, sum upprunaliga ásett. Henda útrokning er galdandi, til kredittavtalan fer úr gildi.
*Stk. 7.* Í tann mun tað gerst neyðugt, kunnu ískoytisfyritreytir í skjali 1 í kunngerðini verða nýttar at rokna árligu kostnaðirnar í prosentum.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, dagfesting

**Magnus Rasmussen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen